# So var Mjølnir-kappingin liðug

**Seinastu kappingarnar í Mjølnir-kappingini vórðu leiktar seinasta vikuskiftið**

Ikki kann sigast annað enn, at januar mánaður er ein av teimum meira hektisku hjá flogbóltinum í Klaksvik. Umframt landskappingarnar, sum liðini taka lut í, so hevur Mjølnir nevnliga trý vikuskifti í januar mánaði verið vertur fyri flogbóltskappingum. Fyrst hjá teimum vaksnu, sum vórðu avgreidd yvir eitt vikuskifti, og síðani hjá yngru liðunum, har kappingin varð býtt sundur í tvey. Fyrst vóru tað tey 10-12 ára gomlu og unglingaliðini, sum dystaðust, og nú seinasta vikuskiftið vóru tað so tey 10 ára gomlu og aldursbólkunum, 12-14, sum avgreiddu sínar kappingar.

Hóast strævið, so var talan í øllum trimum førum um sera væl eydnaðar kappingar, og nú seinastu vinnararnir eru funnir, kunnu tey í Klaksvík so smátt fara at hugsa um aðrar kappingar, har tey ikki eru vertir sjálvi.

Vinnararnir av kappingunum um vikuskiftið framganga av myndunum á síðuni.



*Hjá yngstu gentunum vórðu tað tær úr Fleyr í Havn, sum vunnu gull framman fyri ávíkavist Mjølnir og TB*



*Tvøradreingir tóku sær av gullmerkjunum hjá yngstu dreingjunum. Teimum á baki komu ÍF og Mjølnir*



*Heimaliðið, Mjølnir, sýndi seg at vera sterkasta liðið hjá gentum14, har tær vunnu kappingina frammanfyri Dráttur og TB*



*Eisini hjá dreingjum 14 eydnaðist Mjølnir at vinna. Her varð Nøvan nummar tvey, meðan SÍ gjørdist nummar trý*

# Stór skjótikapping

**Í Runavík kappaðust bæði ung og vaksin í bogaskjóting, og ikki minst í barnakappingini var talan um sera góða undirtøku**

BOGASKJÓTING
*Tíndaskriv*

Leygardagin 18. januar skipaði Bogaskjótifelagið Ørvur fyri kapping fyri børn í Runavík. Skotið bleiv á 12 metra frástøðu.

Við í kappingini vóru 24 børn og ung, og er hetta størsta luttakaratal í eini barnakapping.

Í bólkinum compound vóru 9 luttakarar. Eingin ivi tóktist verða um, hvør skuldi vinna kappingina. 12 ára gamli Alvi Joensen legði seg trygt á odda beinanvegin og økti bara um leiðsluna sum kappingin leið.

Úrslitini vóru: nr. 1 Alvi Joensen við (276+266) 542 stigum og persónligum meti, nr. 2 Alberta Gaardlykke við (256+262) 518 stigum og nr. 3 Ásmundur Gaardlykke við (250+246) 496 stigum, øll úr Ørvi.

Í bólkinum recurve vóru 15 luttakarar og tóktist heldur eingin ivi at vera um, hvør vildi vinna hesa kapping meiri enn hini. Eirikur í Jákupsstovu hevði trygga leiðslu í steðginum og helt áfram við síni góðu skjóting, so leiðslan bleiv tryggari og tryggari fyri hvørt umfar.

Úrslitini vóru: nr. 1 Eirikur í Jákupsstovu við (271+269) 540 stigum og persónligum meti, nr. 2 Annika Vang við (262+247) 509 stigum, bæði úr Ørvi, og nr. 3 Áki Herolvsson, Tambar, við (232+209) 441 stigum.



*Ikki færri enn 24 børn og ung tóku lut í kappingini leygardagin, er hetta størsta luttakaratal nakran tíð til slíka kapping her á landi*

**Vaksin**

Sunnudagin 19. januar varð hildið áfram við kapping fyri tey vaksnu, sum skutu á 18 metra frástøðu.

Í bólkinum compound vóru úrslitini hesi: nr. 1 Schandorff Vang við (281+285) 566 stigum, nr. 2 Per Holm Andersen við (279+277) 556 stigum og nr. 3 Jóan Magnus Skoradal við (271+277) 548 stigum, allir úr Ørvi.

Í bólkinum recurve vóru úrslitini hesi: nr. 1 Rógvi Mohr við (235+248( 483 stigum. Rógvi er ein av teimum nýggju bogaskjúttunum, sum hevur gjørt stór framstig í vetur. Nr. 2 var Annika Vang við (225+206) 431 stigum og nr. 3 Eirikur í Jákupsstovu við (221+210) 421 stigum og persónligum meti.







